

## 16 ára gomul genta handtikin fyri bumbuhóttan

Løgreglan á Suðursælandi hevur í morgun handtikið eina 16 ára gamla gentu fyri eina bumbuhóttan móti Århus Banegård týsdagin og móti Helsingør Station í morgun. Gentan hevur eftir øllum at døma ringt frá stovninum, har hon býr. Uppringingarnar førdu til, at jarnbreytastøðin í Århus seint týsdagin var avbyrgd í tríggjar tímar, og í morgun gekk tað so út yvir tok, bussar og ferjur í Helsingør, tá løgreglan evakueraði støðina og sperraði økið av kring hana. Sambært løgregluni hevur gentan áður gjørt líknandi hóttanir móti Høvuðsjarnbreytini í Keypmannahavn og floghavnini í Kastrup.

# Sambandið vildi lata Javnaðarflokki løgmann

**- men tá Fólkaflokkurin ikki vildi víkja frá sínum kravi um løgmann, varð endin undir samráðingunum, at Sambandsflokkurin sum største flokkur fekk løgmann**

NÝGGJ SAMGONGA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Nú formaðurin í Sambandsflokkinum, Kaj Leo Johannessen verður løgmaður í eini komandi ABC samgongu er eisini greitt, at tað var ikki eitt ultimativt krav frá Sambandsflokkinum at fáa landsins hægsta sess. Sambart keldum, sum Sosialurin hevur tosað við, var orsøkin til, at Sambandsflokkurin loksins fekk løgmann tann, at Fólkaflokkurin ikki bara kravdi løgmann, men eftir øllum at døma vildi ikki góðtaka, at Javnaðarflokkurin fekk løgmann, tó at Sambandsflokkurin vildi ganga við til tað.

Samráðingarnar um málsøkini, sum hava varað í umleið tveir dagar, gingu báðar vegir. Hóast tað ongantíð vóru útlit til, at tað fór at slitna, so skilst, at samgongutelvingin varð rættiliga hørð.

Javnaðarflokkurin vildi hava løgmann m.a. út frá tí sannroynd, at hann var einasti vinstrihalli flokkur í samgonguni. Eitt skifti, skilja vit, gav Sambandsflokkurin seg. Leiðslan í flokkinum metti, at tað kundi hava stabiliserandi týdning fyri samgonguna, við sínum borgarliga meiriluta, at Javnaðarflokkurin fekk løgmann. Men hesum vildi Fólkaflokkurin ikki hoyra talan um. Hann kravdi tí løgmann til tað seinasta, og tá varð tað, at Sambandsflokkurin spældi sítt kort út um, at flokkurin var størstur, og tí vildi hann hava løgmann.

### Revsa Jóannes Eidesgaard

Eygleiðarar siga við Sosialin, at hóast henda telving neyvan fer at fáa nakrar avleiðingar fyri samgongussamstarvið í eini nýggjari ABC samgongu, so er tað tó eitt signal um, at Fólkaflokkurin ynskti ikki at fara í eina samgongu undir javnaðarleiðslu, hvør orsøkin til tað so enn má vera. Her eru sjálvandi fleiri gitingar. Ein er, at flokkurin veruliga helt seg hava krav uppá at fáa løgmann. Onnur giting er, at hetta var fyri at revsa Jóannes Eidesgaard fyri at hava svikið Fólkaflokkin eftir seinasta val. Og enn ein giting er, at tað tók so fast hjá Fólkaflokkinum, tá Jóannes Eidesgaard koyrdi Jákup Vestergaard úr landsstýrinum, at hetta var revsingin: at formaður Javnaðarfloksin nú sjálvur máttu sleppa løgmanssessin.

Keldur í tí politiska umhvørvinum í løgtinginum vildu í morgun vera við, at Javnaðarflokkurin, hóast hann missir løgmann, hevur fingið trý sera týðandi málsøki at umsita, fíggjarmál, mentanarmál og heilsumál. Stórur ivi tykist vera um framtíðina hjá Jóannesi Eidesgaard í landsstýrinum.



*Fólkaflokkurin hevði eftir øllum at døma eitt høvuðsmál undir samráðingunum um býti av málsøkjum, og tað var sambart keldum, at revsa Jóannes Eidesgaard, løgmann fyri at hava "snýtt" flokkin eftir seinasta val og fyri at hava koyrt Jákup Vestergaard úr Tinganesi*

*Mynd Álvur Haraldsen.*

# Tveir nýggir tinglimir

**Broytingin í samgonguni merkir, at nýggj andlit koma á ting, meðan onnur missa sín tingsess. Helgi Abrahamsen og Jaspur Vang koma báðir á ting sum nýggir tinglimir**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nakrar ummøbleringar fara fram í tinginum, nú nýggj samgonga er skipað. Summi missa sín sess í tinginum, meðan onnur taka sæti á løgtingi.

Hjá Fólkaflokkinum og Sambandsflokkinum er talan um, at trý nýggj fólk koma á ting, og hjá Tjóðveldi og Miðflokkinum fara ávikavist fýra og eitt fólk úr tinginum.

Tað verða Bjarni Djurholm, Heðin Zachariassen og Óli Breckmann, sum eiga plássini á fólkaflokslistanum, meðan Marjus Dam, Helgi Abrahamsen og Jaspur Vang standa til at taka sætið á tingi fyri Sambandsflokkin.



*Bjarni Djur holm*



*Heðin Zachariassen*



*Óli Breckmann*



*Helgi Abrahamsen*



*Jaspur Vang*



*Marjus Dam*

Hetta hendir sjálvandi út frá teirri fyritreyt, at hesir báðir flokkarnir velja síni landsstýrisfólk innan fyri tingmanningarnar.

Nýggju fólkafloksumboðini hava øll drúgvar royndir í politikki, Bjarni eisini úr Tinganesi. Óli Breckmann er tann tinglimurin, sum hevur sitið longst á ting i av hesari tingmanninigini.

Hinvegin eru Helgi Abrahamsen og Jaspur Vang nýggir í tinghøpi sum valdir tinglimir. Teir hava tó báðir sitið á tingi sum avloysarar.

### Páll ivasamur

Tríggir av fyrrverandi landsstýrisfólkunum hjá Tjóðveldi taka nú aftur sæti á tingi. Høgni Hoydal, sum umsat uttanríkismál, Bjøet Samuelsen fráfarin vinnumálaráðharri og Tórbjørn Jacobsen, nú fyrrverandi fiski- og tilfeingisráðharri.

Hetta troðkar so Páll á Reynatúgvu, Heidi Petersen og Olgu Biskupstø úr tinginum. Og av tí, at Sjúrður Skaale hevur røkt fólkatingsarbeiðið burturav og ikki hevur verið tinglimur, hevur Finnur Helmsdal, tó seinast Olaf í Garði Joensen sitið á tingi, men hesir missa so nú sín sess.

Enn er eitt sindur óvist, hvussu verður við Páll á Reynatúgvu, tí Høgni Hoydal hevur ikki enn tikið støðu til, um hann fer at røkja fólkatingsarbeiðið burtur av, ella hann fer at røkja tingarbeiðið samstundis.

Eisini Tordur Niclasen missir sín sess á tingi, nú Karsten Hansen fer úr Fíggjarmálaráðnum og aftur í tingið

So alt í alt verður talan um rættiliga fitt av útskiftingum í løgtinginum, og bert Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin varðveita sínar tinglimir.